## Sjavskapping í Vági leygardagin 7. februar

Leygardagin í næstu viku skipar VB/Sumba fyri stórari Sjavskapping í morgin, leygardagin kl 16 í VB húsinum í Vági. Heitið á kappingini er »Suðuroyarmeistari 2009« Fyrireikararnir siga, at øll, sum spæla sjavs, kunnu vera við. Spæl,t verður um steyå, sum Eik Banki í Suðuroy letur. Býtt verður fyrst uppí innleiðandi bólka, síðani verður tað moyrt víðari í Cup-system, alt treytað av, hvussu tað´passar við tilmeldingum av pørum, til 4 – 6 pør eru eftir, siga fyrireikararnir. Lutaseðlar verða eisini seldir, einir 10-15 vinningar. Høvuðsvinningur á lutaseðli er eitt nú olja, telefon, gávubørv og annað. Kaffi og te og smyrjibreyð verða eisini til keyps. Fyrireikararnir siga, at meldast skal til kappingina fyri at verða við. Tað kostar 100 krónur fyri parið. Meldast kann til fram til á middegi fríggjadagin á telefon 373036, 254931 ella 272667

## nnur taka yvir



*Enn er ógreitt, um tað fer at eydnast Maru Seafood at endurreisa virksemið á Kósini í Klaksvík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

túgvan eru ein onnur grein úr Maru Seafood, eins og Grani eisini er tað.

- Tí er virksemi framvegis í gongd á Eiði, eins og línuskipini sigla.

Stjórin í Maru Seafood er fullgreiður yvir, at tíðin er við at renna undan eini endurreisn.

- Tað einasta, eg í løtuni kann siga, er, at vit framvegis arbeiða við at endurreisa fyritøkuna, men vit vita eisini, at okkurt má henda innan stutta tíð.

Jóhan Páll Joensen sigur, at fer tað ikki at eydnast Maru Seafood at endurreisa virksemið, verður neyðugt hjá øðrum at taka yvir.





*Páll Hansen (høgrumegin) er verandi formaður í Maskinmeistarafelagnum, men á komandi aðalfundi fær hann kapping frá Jógvani Nybo*

# Kapping er um formanssessin

**Tvey formansvalevni eru til aðalfundin í Maskinmeistarafelagnum. Verandi formaður, Páll Hansen, stillar uppaftur og Jógvan Nybo, sum áður hevur verið formaður í felagnum, hevur eisini latið seg stilla uppaftur**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Meðan Føroya Fiskimannafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Felagið Føroyskir Fiskimenn Uttanlands halda sínar landsfundir og aðalfundir millum jól og nýggjár, verður ársaðalfundurin hjá Maskinmeistarafelagnum hildin 7. mars.

Á skránni til fundin hjá Maskinmeistarafelagnum verða tey vanligu málini, men hesaferð bjóða tvey valevni seg fram til formanssessin í felagnum.

Síðan freistin at stilla upp til formansessin var úti, er greitt, at verandi formaður, Páll Hansen, letur seg stilla upp aftur.

Jógvan Nybo, sum áður hevur verið formaður í Maskinmeistarafelagnum, stillar eisini upp, og soleiðis verður kapping um formanssessin.

Sambært lógum felagsins kunnu valevni til nevnd stillast upp fyri 15. desember 2008, men nevndarvalevni kunnu eisini stillast upp á sjálvum fundinum.

Á aðalfundinum 7. mars standa verandi nevndarlimir, Regin Olsen og Jørgin Mørkøre, fyri vali.

Maskinmeistarafelagið sigur á síni heimasíðu, at limir, sum ikki vænta at verða heima, tá aðalfundurin verður, kunnu atkvøða við brævatkvøðu á skrivstovu felagsins, sum er opin gerandisdagar millum klokkan 9 og 16. Tað eru virknu limir felagsins, ið hava goldið limagjald fyri 2008, sum hava atkvøðurætt.

Uppmøtingin til aðalfundin í Maskinmeistarafelagnum plagar vanliga ikki at vera serliga góð í mun til limatal felagsins, men kanska fer kappingin, sum nú verður um formanssessin, at fáa fleiri limir til fundar.

# Nýggjur sáttmáli um samlagstrygging

**Á aðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum fer nevndin eisini at kunna nærri um nýggju avtaluna, sum felagið hevur verið við til at gera við LÍV**

TRYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu tíðina hevur umrøðan um tryggingar og eftirløn tikið seg uppaftur og sonevndi pensjónsreformurin, sum leingi hevur verið upp á tal, hevur eisini verið til umrøðu á almennum fundi.

Men so leingi, sum eingin felags reformur er galdandi fyri allar løntakarar, arbeiða feløg hvør í sínum lagi við at tryggja sínar limir sum frægast.

Tann 22. desember 2008 undirskrivaðu LÍV og yvirmannafeløgini undir nýggjan sáttmála um samlagstrygging, sum kom í gildi 1. januar 2009.

Á heimasíðuni hjá Maskinmeistarafelagnum verður upplýst, at tryggingarupphæddin fyri limir upp til 50 ára aldur nú er hækkað úr 450.000 krónum upp í 700.000 krónur.

- Fyri hvørt árið, sum limur er eldri enn 50 ár, lækkar gjaldið síðani við 25.000 krónum soleiðis, at upphæddin við 66 ára aldur verður 300.000 krónur, víssir felagið á.

Tryggingarupphæddin fyri hættisligar sjúkur verður hækkað úr 75.000 krónur uppí 100.000 krónur.

- Ymiskar aðrar broytingar eru eisini gjørdar, og nærri verður kunnað um hetta seinni, sigur Maskinmeistarafelagið á síni heimasíðu.